


# Kemilux satisfies all cleaning requirements

**Through the acquisition of Sirius and the establishment of the outlet Veitaranum, we can now to a much greater extent call ourselves a total supplier of detergents and cleaning articles, as well as a supplier of packaging material, packaging equipment, machinery and work mans clothing for businesses and industrial purposes", says Mr Arni Gunnarsson, Sales Manager at Kemilux**



Kemilux is among the Faroe companies exhibiting at Fish Expo Faroes 2009.

The company has expanded considerably over the past few years and has split its activities into two separate sectors. Production and accounting is one unit, while the outlet, e.g. "Veitarin" and the warehouse, represent the second unit.

Kemilux endeavours to be the best supplier of quality cleaning- and detergent products, as well as accessories and equipment for businesses, industries, institutions and the common household.

## Three operational areas

Mr Gunnarsson, Sales Manager says the company is capable of meeting all cleaning requirements – from heavy duty cleaning on a vessels deck and the engine room to highly specialised cleaning, as demanded by the food processing industry.

**At Kemilux, they subdivide their operations into three distinct groups:**

1. The Food industry, comprising fish factories, large kitchens, etc.
2. Dirty business, such as vessels shipyards the oil industry, etc.
3. Soft business, which is institutions and the common household.

Approximately one third of the Kemilux production is exported. As the fishing industry in Denmark has been contracting over the past few years, more and more is being supplied to cargo vessels.

Among buyers of products from Kemilux, are vessels from the large Danish shipping company Mærsk.

-We have always paid the marine industry particular attention, and today we can confirm that our products are present onboard several vessels sailing all over the world".

Mr Gunnarsson says the feedback they receive, regarding the quality of their detergent products in general have been very positive.

## Excellent brand

Kemilux Industry is very pleased that the oil industry, more and more has taken an interest in their products,

# Kemilux nøktar allan reingerðartørv

**- Við keypinum av Siriusi og stovnanini av handlinum Veitaranum kunnu vit nú í enn størri mun rópa okkum heildarveitara av reingerðarevnum, eins og vit nú eisini eru veitarar av pakkitilfari, pakkiamboðum, maskinum og arbeiðsklæðum til eitt nú vinnu og ídnað, sigur Arni Gunnarsson, søluleiðari hjá Kemilux Industri**



Kemilux Industri er millum føroysku fyritøkurnar, sum vera við á Fish Expo Faroes 2009.

Fyritøkan er nógv økt seinastu árini og hevur tískil skilt virksemið sundur í tveir partar, har framleiðsla og bókhald húsast fyri seg og handilin "Veitarin" og goymslan eru fyri seg.

Kemilux Industri leggur seg eftir at vera fremsti veitari av dygdarbestu reinsi-og vaskievnum, umframt tilhoyri og amboðum til vinnu og íðna, eins væl og til stovnar og húsarhald.

## Trý virkisøki

Arni Gunnarsson, søluleiðari, sigur, at fyritøkan er før fyri at nøkta allan reingerðartørv yvirhøvur – heilt frá grovreingerðing á skipsdekki og maskinrúmum til serliga tørvin innan reingerð, sum eitt nú matvøruídnaðurin krevur.

Á Kemilux býta tey virkisøkini upp í tríggjar bólkar 1) Food Industry, sum eru fiskavirki, stórkøkar og annað, 2) Dirty Business, sum er skip, skipasmiðjur, oljuvinna og annað og 3) Soft Business, sum eitt nú er stovnar og húsarhald.

Umleið ein triðingur av framleiðsluni hjá Kemilux verður seldur av landinum, og nú fiskivinnan í eitt nú Danmark hevur verið minkandi seinnu árini, fara fleiri og fleiri vørur umborð á farmaskip.

Millum keyparar av vørum hjá Kemilux, eru eitt nú skip hjá stórreiðaríinum, Mærsk.

- Vit hava altíð sýnt sjóvinnuni serligan ans, og í dag kunnu vit staðfesta, at okkara framleiðsla finst umborð á fleiri skipum kring um á heimshøvunum.

Arni Gunnarsson sigur, at afturmeldingarnar um dygdirnar hjá vaskievnunum, sum fyritøkan framleiðir, sum heild hava verið sera positivar.

## Góð vørumerki

Kemilux Industri kann eisini fegnast um, at oljuvinnan í størri og størri mun vísir vørunum ans og er vorðin ein partur av marknaðinum.

- Ein av okkara fyrstu vørum, sum stavar heilt aftur til 1968, var rustloysarin til viðlíkahald uttandura. Rustblettir og málaðar flatur kunnu viðgerast við hesum evni og síðan spulast við vatni. Úrslitini hava víst seg at vera sera munadygg, og